# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Tórshavnar alfrøði við konfirmantamyndum í SMS

Í sambandi við „Tórshavnar alfrøði", ið kemur út í november í ár, verður ein áhugaverd framsýning á Torginum í SMS frá mánadegi 13. februar og vikuna út.

Ein partur av havnarsøgu eru konfirmatiónirnar, og tað er hesin parturin, ið verður sýndur fram á Torginum í komandi viku.

Birgar Johannessen hevur í gott fýra ár arbeitt við at savna søguligt tilfar um Havnina í tíðarskeiðinum 1900-1970.

Umleið 80 konfirmantamyndir eru á framsýningini. Á teimum flestu eru nøvnini komin upp á pláss, men tó eru tað nøkur ið mangla.

Í tíðarskeiðnum millum 1900 og 1970 hava umleið 140 konfirmatiónir verið í Havn. Av hesum hevur Birgar fingið umleið 60 prosent av myndunum.

Myndirnar á framsýningini verða settar upp kronologiskt og byrja við árinum 1900, men har sum ongar myndir eru, er eitt yvirlit yvir nøvnini á konfirmantunum, soleiðis at til ber hjá fólki, sum evt. kenna persónar á yvirlitinum, at fáa hendur á myndunum, um tær eru til.

Birgar heitir á fólk um at koma til framsýnigina, fyri at vita um tey persónar á myndunum.

Av tí at nógvir av persónunum eru úr bygdunum nærhendis Havnini, roknar Birgar við at fólk í Nólsoy, Velbastað, Kirkjubø, Hesti, Koltri, Norðradali og Kaldbak kanska liggja inni við nøkrum av teimum myndunum, ið hann manglar.

Endamálið við framsýningini er at fáa hendan partin av Havnar søgu so rættan sum gjørligt og helst fáa fatur á øllum myndunum, ið tiknar eru, nú tær skulu við í „Tórshavnar alfrøði", sum kemur út í november.

Fólk, sum koma til framsýningina, fáa eisini ein lepa við 10 áhugaverdum upplýsingum um konfirmantarnar hesi 70 árini.

Tórshavnar alfrøði:

## Konfirmantar í 1926



Hendan myndin er av konfirmantunum sum blivu fermdir í Havnar kirkju tann 3. oktober 1926. Konfirmantarnir vóru 27 í tali, 19 gentur og 8 dreingir. Á myndini eru 15 gentur og 4 dreingir, sostatt eru 4 gentur og 4 dreingir ikki við á myndini.

Annars vóru konfirmantarnir hesir: Johanne Mortensen, Anna Elisabeth Joensen, Johanne Henrikke Johannessen, Johanne Theodora Hansen, Astrid Hansen, Magnhild Marie Hansen, Helene Katrine Mørk, Kaja Poulsen, Sofie Vardum, Malene Sofie Egholm, Elly Margrethe Olsen, Nikolie Lovisa Augusta Jensen, Marie Margrethe Frederikke Krogh, Petra Johanne Cathrine Thomsen, Eivind Sofus Emil Poulsen, Arnold Martin Karbeck Mouritsen, Svend Børge Rubek Nielsen, Hans Debes og Christian Dahl Christiansen, øll hesi eru úr Havn. Síðani vóru tað Vilborg Maurentse Sofie Nolsø (Kaldbak), Susanne Johanne Kristine Joensen (Hvítanes), Johanne Helene Sofie Joensen (Koltur), Olevine Elisabeth Mortensen (Argir), Maria Magdalene Holm (Argir), Joen Karsten Hoydal (Hoyvík), Arne Magnus Hoydal (Hoyvík) og Joen Anton Martin Peter Nybo (Hestur).

Vit kenna nakrar av konfirmantunum, aftasta røð f.v. nr. 3) Nikolie Lovisa Augusta Jensen, Nr 4) Johanne Henrikke Johannessen, nr. 6) Kaja Poulsen.

Miðjan f.v.: Nr. 1) Anna Elisabeth Joensen, nr 2) Elly Margrethe Olsen, nr. 3) Svend Børge Rubek Nielsen og nr. 5) Johanne Mortensen.

F.f.v.: Nr. 1) Arnold Martin Karbeck Mouritsen, nr. 3) Sofie Vardum, nr. 4) Johanne Helene Sofie Joensen (Koltur) og nr. 6) Hans Debes.

Kann nakar hjálpa okkum við at fáa hini uppá pláss, so vinarliga ring til Birgar Johannessen á tlf. 314647 ella 214647.

**Prógv**
Sára Eriksdóttir Johansen, Tvøroyri, hevur 27. januar lokið prógv sum bioanalytikari (Professionsbachelor i Medicinsk Laboratorieteknologi) við Bioanalytikaraskúlan í Keypmannahavn.

24. januar tók Martina Hansen, Klaksvík, prógv sum professiónsbachelor sum sosialráðgevi frá Den Sociale Højskole í Odense.

Joan Mortensen, Tórshavn, hevur 30. januar 2006 lokið prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur á Bachelor støði frá Næstved sygeplejerskole í Danmark.

**50 ár**
Mánadagin 13. februar verður Anna Hansen, Saltangará 50 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 11. februar í Sjókaféini kl. 19.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**75 ár**
Leygardagin 11. februar verður Sólrun Jensen á Sandi 75 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

Sunnudagin 12. februar fyllir Lilja Hansen á Nesi 75 ár. Dagurin verður hildin 11. februar hjá dóttrini Hansu í Skálabotni.

**90 ár**
Í dag, 10. februar verður Sunneva Gram, 90 ár. Vælkomst verður í Sigmundargøtu 4, frá kl. 18.00.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 12. februar hava Borghild og Jóhannes Martin Olsen, verið gift í 50 ár. Tey eru stødd hjá soninum Jóhan Petur Olsen, adr:
3-6588 Southoak Cressent
Burnaby, BCV51 4K1
Kanada
E-mail: johan@cobbcanada.ca
Tlf. 001-604 526 8206

